Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	04.11.2025
Mál nr.:	22/13718
Málsviðgjørt:	TM, BAB, JS
Ummælistíð:	17.09.25 til 03.10.25
Eftirkannað:	19. okt. 2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)
(Greiðari ásetingar um, nær útgjøld byrja og inngjøld steðga, heimildin fyri frítøku í sambandi við tíðaravmarkað starv verður strikað, umframt tekniskar broytingar og fylgibroytingar av broyttari lóggávu á almannaøkinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn (Eftirlønarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 4 verður "skal" broytt til: "kann".

2. § 1, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Eftirlønarsamansparing hjá persóni, sum hevur uppihildið sær í Føroyum í í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt, og sum er fluttur av landinum aftur, kann rindast út aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur."

3. Í § 1 verður sum stk. 6 sett:
"*Stk. 6.* Persónur, sum eina ferð hevur fingið eftirlønina útgoldna sbrt. stk. 5 og kemur aftur til Føroya at arbeiða, kann tó ikki fáa eftirlønina útgoldna fyrr enn 10 ár aftaná, at persónurin er fluttur av landinum aftur."

4. Í § 1, stk. 8 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Hevur persónur ikki stovnað eftirlønarkonto innan tríggjar mánaðir frá tí, at persónurin hevur móttikið inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av, kann TAKS vegna persónin stovna eftirlønarkonto hjá góðkendum eftirlønarveitara sbrt. § 5, stk. 1. og flyta eftirlønarsamansparing, ið stendur á depotkonto hjá TAKS sbrt. § 16 a, til eftirlønarkonto hjá persóninum."

5. Í § 2, stk. 8, 1. pkt. verður aftan á "eftirlønargjaldi" sett: "eftir skatt".

6. § 2, stk. 10 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 10.* Er eftirlønargjaldið av A-inntøku minni enn 30 krónur, verður tað ikki álagt at rinda sbrt. hesi løgtingslóg. Er eftirlønargjaldið av B-inntøku minni enn 500 krónur, verður tað ikki álagt at rinda sbrt. hesi løgtingslóg."

7. Í § 2 verður sum stk. 11 sett:
"*Stk. 11*. Skuldkomið eftirlønargjald fellur burtur, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., ella tá ið eftirlønarsamansparari doyr."

8. Í § 3, nr. 10 verður aftan á "12," sett: "13 a,".

9. § 3, nr. 11 verður orðað soleiðis:
"11) Útgjaldi sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar."

10. § 3, nr. 14 verður orðað soleiðis:
"14) Útgjaldi sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, tó undantikið útgjald sambært § 12, § 13 og § 25."

11. § 3, nr. 15 verður strikað.
Nr. 16-18 verða eftir hetta nr. 15-17.

12. § 3, nr. 18, sum verður nr. 17, verður orðað soleiðis:
"17) Inntøka frá arbeiði fyri arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, um løntakarin annaðhvørt rindar til NAV ella hevur eftirlønarskipan uttanlands, sum TAKS metir er nøktandi, og har inngjaldið annaðhvørt einsæris ella saman við inngjaldi í Føroyum er á sama støði sum kravt í § 2, stk. 1. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um, hvat er at meta sum nøktandi eftirlønarskipan uttanlands."

13. § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Útgjald av eftirlønarsamansparing, við undantaki av stk. 5 og 9, byrjar fyrsta mánaðin eftir, at eftirlønarsamansparari røkkur fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Í samansparingartíðarskeiðinum er alt virðið, ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum kapitaleftirløn við arvarætti, um eftirlønarsamansparari ikki hevur gjørt aðra avtalu."

14. § 9, stk. 2, 3. pkt. verður orðað soleiðis:
"Í fráboðanini til TAKS verður upplýst, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal gjaldast út, undir hesum peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal flytast til."

15. Í § 9 verða sum stk. 10-12 sett:
"*Stk. 10.* Eftirlønarsamansparari skal í sambandi við útgjald sbrt. stk. 1 og í sambandi við fráboðan sbrt. stk. 2 í seinasta lagi tveir mánaðir áðrenn útgjald byrjar, lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal flytast til.
Stk. 11. Eru neyðugu upplýsingarnar um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnar eftirlønarveitaranum, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjaldið á depotkonto, sum eftirlønarveitari kann stovna til eftirlønarsamanspararan, og sum ikki fær tilskrivað avkast. Eru upplýsingar um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnar eftirlønarveitara, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjald á sentrala og løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er knýtt at skipanini Vangin.
Stk. 12. Ásetingarnar í stk. 2, um býtið av samansparda virðinum

útgjaldsdagin, og í stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. stk. 11.”

16. Í § 12, stk. 3, 2. pkt. verður “§ 1, stk. 6 og” strikað.

17. Í § 15 verður sum stk. 1 sett:
“*Stk. 1.* Flyting áðrenn útgjaldsdagin frá eini eftirlønarsamansparing til eina aðra verandi ella nýggja eftirlønarsamansparing her í landinum hjá sama persóni verður ikki viðgjørd sum útgjalding ella inngjalding. Landsstýrisfólkið ásetir í kunngerð nærri reglur.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið til broytingar í eftirlønarlógini verður lagt fyri Løgtingið fyri at lætta um umsitingina av eftirlønarlógini fyri borgarar og fyri TAKS.

1.2. Galdandi lóggáva
Lógargrundarlagið undir føroyskum eftirlønum er eftirlønarlógin og rentutryggingarlógin. Viðurskiftini kring eftirlønina valdast, hvørjari av hesum báðum lógum, eftirlønin er goldin eftir. Eftirlønarlógin kom í gildi 1. januar 2014. Eftirlønir, sum eru goldnar eftir hetta, verða goldnar sambært eftirlønarlógini.

Rentutryggingarlógin kom í gildi í 1972, og hon var einasta lóg á eftirlønarøkinum, áðrenn verandi eftirlønarlóg kom í gildi. Rentutryggingarlógin heimilaði millum annað frádrátt fyri tær eftirlønir, sum vóru fevndar av lógini, til og við 31. desember 2013, tá eftirlønarlógin tók yvir.

Hetta uppskotið til broytingarlóg, snýr seg um at gera broytingar í eftirlønarlógini.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at lætta um umsitingina av eftirlønarlógini fyri borgarar, TAKS og fyri arbeiðsgevarar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Í uppskotinum til broytingar í eftirlønarlógini eru tilsamans 17 broytingar, sum mælt verður til at gera í eftirlønarlógini:

1. Í § 1, stk. 4 verður *skal ikki* broytt til *kann ikki*.
2. Frítøka fyri persónar, sum flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, verður strikað. Í staðin verður heimild at rinda út aftur samansparing - § 1, stk. 5 í eftirlønarlógini.
3. Áseting verður sett inn í stk. 6 um, at persónar ikki í fleiri umførum kunnu fáa eftirløn útgoldna. T.e. skal persónur hava eftirløn útgoldna á øðrum sinni, tí viðkomandi flytur av landinum, so skal viðkomandi ikki hava búð í Føroyum í 10 ár.
4. Depotkontur - § 1, stk. 8 í eftirlønarlógini. TAKS kann vegna persónin stovna eftirlønarkonto hjá góðkendum eftirlønarveitara, um viðkomandi ikki hevur stovnað eftirlønarkonto innan tríggjar mánaðir frá tí, at persónurin hevur móttikið inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av.
5. Gjørt verður greitt í § 2, stk. 8, at talan er um ein triðing av eftirlønargjaldinum, eftir at skattur er goldin.
6. Markið fyri, nær TAKS skal senda eftirlønarkrav av B-inntøkum hækkar til 500 kr. T.e. minstamarkið fyri eftirlønargjaldið verður 500 kr.
7. Ásett verður í eftirlønarlógina, at eftirlønargjøld, sum enn ikki eru goldin, tá ið persónur doyr, ella røkkur fólkapensjónsaldur, fella burtur.
8. Fylgibroyting orsakað av broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. § 13 a er sett inn í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eftirfylgjandi.
9. Rætting í eftirlønarlógini og fylgibroyting av, at heitið á løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar er broytt.

10. Fylgibroyting av, at løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021, og av at samstundis varð sett úr gildi lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg.
11. Fylgibroyting av, at løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening er sett úr gildi.
12. Heimild til, at persónar, sum hava eftirlønarskipan uttanlands, sum tó ikki rinda lógarkravdu upphæddina til ta skipanina, kunnu rinda munin í Føroyum.
13. Útgjøld skulu byrja mánaðin eftir, at eftirlønarsamanspararar røkka fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir, tó við undantøkunum í stk. 5 og 9.
14. Ásett verður, at upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal gjaldast út til, skulu vera í fráboðan til TAKS um, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal gjaldast út.
15. Ásett verður, at eftirlønarsamansparari skal lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal gjaldast út til. Eftirlønarveitari kann flyta útgjaldið á depotkonto, ið ikki fær tilskrivað avkast, um upplýsingarnar ikki eru latnar eftirlønarveitaranum (t.e. útgjaldið kann í tílíkum førum flytast á konto ella tryggingaravtalu, sum eftirlønarveitari kann stovna vegna samanspararan, og sum ikki gevur rætt til avkast). Eftirlønarveitari kann eisini flyta útgjald á sentrala, løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er knýtt at Vanganum, tá ið hesar væntandi eru liðugt mentar frá 2028. Ásett verður eisini, at býtið av útgjaldinum millum kapitalútgjald, lutaeftirløn og lívlanga veiting skal gerast samsvarandi ásetingunum um hetta í stk. 2 í § 9, og hetta er eisini galdandi fyri útgjald sbrt. stk. 11. Ásett verður eisini, at eftirlønarveitari í nevndu førum skal rinda útgjald mánaðarliga umvegis afturhaldsskipanina sbrt. § 9, stk. 6 í lógini.
16. Tilvísingin til § 1, stk. 6 verður strikað í § 12, stk. 3, 2. pkt. Talan er um eina fylgibroyting av einari eldri broyting í eftirlønarlógini. Av tí at § 1, stk. 6 í hesum føri verður endurnýtt (broyting nr. 3), verður mett greiðast at strika tilvísingina til § 1, stk. 6 í § 12, stk. 3, 2. pkt.
17. Heimild at flyta eftirløn ella savna saman eftirløn hjá einum veitara – Nýtt § 15 stk. 1 í eftirlønarlógini.

Nevnast kann, at viðvíkjandi ætlanunum um at gera ásetingarnar um, nær samanspararar fara í útgjald og nær inngjøld steðga (broyting nr. 1 og nr. 13), hevur Fíggjarmálaráðið hugt at, hvussu líknandi ásetingar og reglur eru í samsvarandi skipanum í Grønlandi og í Íslandi. Líknandi ásetingar í Grønlandi og í Íslandi eru munandi greiðari enn verandi ásetingar í Føroyum, og eru bara grundaðar á aldur, og ikki um samanspararar móttaka almenna fólkapensjón ella aðra almenna veiting.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Umframt at hava ligið alment frammi á hoyringarportalinum hjá Føroya landsstýri í august og september 2025, er uppskotið eisini sent til ummælis hjá hesum hoyringarpørtum:

Almanna- og mentamálaráðið
Almannaverkið
Kommunufelagið
TAKS
Tryggingareftirlitið
Føroya Arbeiðarafelag
Føroya Arbeiðsgevarafelag (Vinnuhúsið)
Betri Pensjón
Felagið Peningastovnar

Gjaldstovan
Lív
Landsbankin
Landsfelag Pensjónista
Samtak
Fakfelagssamstarvið

Hoyringarsvar eru komin frá Landsbankanum, TAKS, Antares, Fakfelagssamstarvinum, Betri Pensjón, Lív, Betri Banka, Lívsverki, Samtaki, Føroya Arbeiðsgevarafelagi og Gjaldstovuni.

Fakfelagssamstarvið, Landsfelag Pensjónista, Almanna- og mentamálaráðið og Almannaverkið hava ikki viðmerkingar til lógaruppskotið.

Niðanfyri verður í stuttum greitt frá, hvørjar viðmerkingar ummælispartarnir hava. Greitt verður eisini frá, hvørja støðu Fíggjarmálaráðið hevur til viðmerkingarnar.

Ummælissvar frá Landsbankanum
Landsbankin viðmerkir til §1, stk. 12 í lógaruppskotinum, sum snýr seg um at broyta verandi §9, stk 1 í eftirlønarlógini. Landsbankin hevur viðmerking til uppskotið um at áseta, at *útgjald av eftirlønarsamansparing við undantaki av stk. 5 og 9, byrjar fyrsta mánaðin eftir, at eftirlønarsamansparari røkkur fólkapensjónsaldur.*

Landsbankin nevnir síðani tvey atlit í hesum sambandi. Fyrra atlitið er til mótrokning í fólkapensjónini. Seinna atlitið er til inntøkujavning yvir liviár.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Til ber ikki at knýta útgjald úr privatu eftirlønarsamansparingini at, um fólk móttaka fólkapensjón ella ikki. Ein tílík skipan hevði verið ógjørlig at umsitið serliga fyri eftirlønarveitarar. Harafturat hevði hetta havt avleiðingar við sær fyri inngjaldstíðarskeiðið, sum eisini høvdu gjørt umsitingina av lógini truplari, serliga fyri arbeiðsgevarar, sum skulu rinda út løn til lønmóttakarar.

Lýsingin hjá Landsbankanum av, hvussu reglurnar og ásetingarnar í lógini eru í dag um, nær samansparingar í fyrsta lagi kunnu og í seinasta lagi skulu fara í útgjald, samsvara ikki við, hvussu galdandi reglur í eftirlønarlógini eru um hetta.

Reglurnar eru í dag (§ 9, stk. 1 í eftirlønarlógini), at "*Eftirlønarútgjald kann, við undantaki av stk. 5 og 9, í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón.*"

Hetta merkir, at samansparingar *kunnu fara* í útgjald við fólkapensjónsaldur, men persónar *kunnu eisini útseta tað at fara í útgjald* til tey móttaka fólkapensjónina, til dømis um tey eru í skipanini viðvíkjandi *útsettari pensjón*. Reglurnar eru sostatt ikki soleiðis í dag, sum Landsbankin nevnir í viðmerkingunum, *at eftirlønin ikki skal gjaldast út fyrr enn persónurin byrjar at fáa fólkapensjónina útgoldna*.

Í dag er støðan hon, at flestu eftirlønarsamanspararar velja at seta sína samansparing í útgjald við almenna fólkapensjónsaldurin, og hetta er eisini galdandi millum tey, sum eru í skipanini viðvíkjandi *útsettari pensjón*.

Til ber at fara *inn í* og *úr aftur* skipanini viðvíkjandi *útsettari pensjón* upp til tvær ferðir. Hetta merkir, at til ber ikki til at áseta eina treyt um, at samanspararar skulu móttaka fólkapensjón, áðrenn til ber at fara í útgjald. Varð ein treyt fyri at fara í útgjald ásett um, at samanspararar skulu hava móttikið fólkapensjón, kundu fólk, tá tey annars ynskja tað, farið úr skipanini viðvíkjandi útsettari pensjón og móttikið fólkapensjón. Tá høvdu tey lokið treytirnar fyri at fara í útgjald viðvíkjandi privatu eftirlønarsamansparingini.

Tí er einki endamál í at áseta, at fólk kunnu ikki fara í útgjald, fyrr enn tey hava móttikið fólkapensjón, og hetta hevði verið ógjørligt at umsitið serliga fyri eftirlønarveitarar.

Arbeiðsgevarar fáa onga sjálvvirkandi kunning um og hava ongan møguleika at halda skil á, um lønmóttakarar eru í skipanini viðvíkjandi *útsettari pensjón* ella um tey móttaka fólkapensjón. Hetta hevur týdning í sambandi við inngjald til eftirlønarsamansparing.

Harafturat kann verða nevnt, at verða broytingarnar gjørdar, sum skotið verður upp í lógaruppskotinum, fer framhaldandi at bera til hjá fólki at spara saman *eftir almenna fólkapensjónsaldurin* í øðrum uppsparingarskipanum, til dømis í peningastovnum, um fólk ynskja at gera tað eftir almenna fólkapensjónsaldurin.

Sambært eftirlønarlógini skal útgjaldið vera samansett sum í minsta lagi 55% lívrenta, í mesta lagi 15% útgjald í einum og í mesta lagi 45% sum útgjald í lutum, har ið lutatíðarskeiðið er í minsta lagi 10 ár. Tí verður sum heild sera lítil ella eingin ávirkan á mótrokning í fólkapensjónini í framtíðini av hesum broytingunum.

Viðvíkjandi seinna atlitinum um at javna inntøkuna yvir liviárini metir Fíggjarmálaráðið ikki, at hesar broytingarnar fara at ávirka ta javningina. Longu í verandi skipan er sera ómakaleyst hjá samanspararum at seta sína samansparing í útgjald við almenna fólkapensjónsaldurin, hóast tey arbeiða eftir almenna fólkapensjónsaldurin og møguliga eru í skipanini viðvíkjandi *útsettari pensjón*. Tað vísir seg eisini, at flestu samanspararar seta sína samansparing í útgjald, tá ið tey hava møguleika til tað við almenna fólkapensjónsaldurin, eisini hóast tey eru á arbeiðsmarknaðinum nøkur ár eftir tað.

Ummælissvar frá TAKS
TAKS hevur tvær viðmerkingar til orðing av tveimum greinum í lógaruppskotinum.

Til nr. 6 - § 2, stk. 10:
TAKS metir, at orðingin kann skiljast soleiðis, at eingin eftirløn skal roknast, um B-inntøka er minni enn 500 kr. Ætlanin er sjálvsagt, at eingin eftirløn skal rindast, um *eftirlønargjaldið* er minni enn 500 kr. TAKS mælir til at nágreina orðingina.

Til nr. 15 - § 9, stk. 10:
Ásett verður, at eftirlønarveitari kann flyta útgjald á depotkonto, ið ikki fær tilskrivað avkast. TAKS mælir til, at gjørt verður greitt, at talan *ikki* er um depotkonto hjá TAKS sbrt. § 16a í eftirlønarlógini, men at talan sjálvsagt má vera um depotkonto hjá eftirlønarveitara.

Harafturat metir TAKS, at tað eigur at verða ásett, hvussu eftirlønarveitari skal gera býtið av útgjaldinum millum kapitalútgjald, lutaeftirløn og lívlanga veiting. Talan er um valið, sum samansparari ger sbrt. § 9, stk. 2 í eftirlønarlógini. TAKS gongur út frá, at eftirlønarveitari í nevndu førum skal rinda útgjald mánaðarliga umvegis afturhaldsskipanina sbrt. § 9, stk. 6 í lógini.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Fíggjarmálaráðið tekur undir við viðmerkingunum og rættingunum frá TAKS og hevur tillagað og nágreinað lógaruppskotið samsvarandi.

Ummælissvar frá Antares
Antares hevur viðmerkingar til broyting nr. 12 í lógaruppskotinum, tað er til uppskotið til broyting av verandi § 3, stk. 1, nr. 18 (sum verður nr. 17). Antares metir, at broytta § 3, stk. 1, nr. 17 (núverandi nr. 18) eigur at fevna um aðrar skipanir enn NAV og eftirlønarskipanir uttanlands.

Antares mælir til, at orðingin verður broytt, soleiðis at hon er enn meira í samsvari við *Norðurlendsku Konventiónina um Sosiala Trygd* og møguligar aðrar skipanir, Føroyar hava avtalu um við onnur lond. Antares metir, at tá ið einans NAV verður nevnt, kunnu føroyingar, ið eru sosialt tryggjaðir í til dømis Svøríki, koma í klemmu, tí hesi gjalda inn og skulu fáa eftirløn frá Svøríki.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Eftirløn sbrt. eftirlønarlógini er ein *privat eftirløn*, hóast hon er tvungin. Privat eftirløn er ikki fevnd av Nordisk konvention om sosial sikring.

Fíggjarmálaráðið og TAKS meta, at neyðugt er at nevna í nr. 18 (sum verður nr. 17) heitið á sosialum skipanum, sum geva rætt til undantak frá skylduni at gjalda eftirløn sbrt. eftirlønarlógini. Fíggjarmálaráðið og TAKS meta, at tað verður ógjørligt hjá nøkrum stovni til einhvørja tíð at eftirkanna og halda skil á, hvat galdandi er fyri einstakar sosialar skipanir uttanlands og um tær geva rætt til pensjón ella eftirløn.

Ummælissvar frá Betri Pensjón
Betri Pensjón tekur ikki undir við ætlaðu ásetingini um, at útgjald av egnari eftirløn skal byrja mánaðin eftir, at eftirlønarsamanspararin røkkur fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir (meðan tað framvegis skal vera møguligt at útseta fólkapensjónina til persónligur pensjónsaldur er rokkin).

Betri Pensjón tekur ikki undir við grundgevingunum fyri hesum, og vísir á, at tað ongan umsitingarligan týdning hevur fyri Betri Pensjón, nær ein samansparari velur at fáa sína eftirløn útgoldna, og at verandi skipan hvørki er ógreið ella tvørlig. Hon gevur hinvegin samanspararanum rásarúm at velja útgjaldstíðspunkt eftir egnum tørvi sbrt. Betri Pensjón.

Betri Pensjón vísir á, at ilt er at síggja, hvussu tað gagnar samfelagnum at tvinga útgjald av egnari eftirløn, meðan fólkapensjónin framhaldandi kann útsetast. Heldur kann ein slík skipan hugsast at gerast dýrari fyri samfelagið, tí minni eftirløn verður eftir at mótrokna fólkapensjónina við, tá hon einaferð kemur til útgjaldingar. Hetta skal eisini metast í mun til, at fólkapensjónin hækkar fyri hvørt ár, hon verður útsett.

Betri Pensjón vísir á, at ætlaða broytingin skerjir grundleggjandi rættin hjá samanspararanum sjálvum at gera av, nær egin uppsparing skal gjaldast út. Verandi skipan er sbrt. Betri Pensjón hvørki ógreið ella tvørlig. Tvørturímóti hevur samanspararin møguleika fyri at renta samansparingina og soleiðis økja um hana, við at útseta útgjaldingina, eisini hóast samanspararin ikki rindar inn til eftirløn eftir náddan pensjónsaldur.

Betri Pensjón vísir á, at tað als ikki er neyðugt at gjalda út eina samansparing bert tí inngjøldini steðga, og at tað onga umsitingarliga ávirkan hevur, sum annars verður sagt í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Til ber at fara *inn í* og *úr aftur* skipanini viðvíkjandi *útsettari pensjón* upp til tvær ferðir. Hetta merkir, at til ber ikki til at áseta eina treyt um, at samanspararar skulu móttaka fólkapensjón, áðrenn til ber at fara í útgjald. Varð ein treyt fyri at fara í útgjald ásett um, at samanspararar skulu hava móttikið fólkapensjón, kundu fólk, tá tey annars ynskja tað, farið úr skipanini viðvíkjandi *útsettari pensjón* og móttikið fólkapensjón. Tá høvdu tey lokið treytirnar fyri at fara í útgjald viðvíkjandi privatu eftirlønarsamansparingini.

Arbeiðsgevarar fáa onga sjálvvirkandi kunning um og hava ongan møguleika at halda skil á, um lønmóttakarar eru í skipanini viðvíkjandi *útsettari pensjón* ella um tey móttaka fólkapensjón. Hetta hevur týdning í sambandi við inngjald til eftirlønarsamansparing.

Harafturat kann verða nevnt, at verða broytingarnar gjørdar, sum skotið verður upp í lógaruppskotinum, fer framhaldandi at bera til hjá fólki at spara saman *eftir almenna fólkapensjónsaldurin* í øðrum uppsparingarskipanum, til dømis í peningastovnum, um fólk ynskja at gera tað eftir almenna fólkapensjónsaldurin.

Útgjaldið skal sambært eftirlønarlógini vera samansett sum í minsta lagi 55% lívrenta, í mesta lagi 15% útgjald í einum og í mesta lagi 45% sum útgjald í lutum, har ið lutatíðarskeiðið er í minsta lagi 10 ár. Fíggjarmálaráðið metir tí sum heild, at sera lítil ella eingin ávirkan verður á mótrokning í fólkapensjónini í framtíðini av hesum broytingunum.

Ummælissvar frá Lív
Tryggingarfelagið Lív tekur sum heild undir við lógaruppskotinum og við broytingunum, sum mælt verður til at seta í verk. Lív vísir á eitt tekstbrot í lógaruppskotinum, sum er komið skeivt fyri.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Talan er um eitt eldri brot, sum skuldi verið strikað úr lógaruppskotinum. Fíggjarmálaráðið hevur strikað viðkomandi brot.

Ummælissvar frá Felagnum Peningastovnar
Felagið Peningastovnar hevur ongar løgfrøðiligar viðmerkingar til lógaruppskotið. Felagið hevur tó eina tekniska viðmerking til lógaruppskotið, sum snýr seg um § 1, nr. 10 og nr. 11.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Fíggjarmálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Felagnum Peningastovnar og hevur tillagað lógaruppskotið samsvarandi.

Ummælissvar frá Lívsverki
Lívsverk tekur sum heild undir við lógaruppskotinum. Lívsverk viðmerkir tó, at gott hevði verið at fingið áseting um, at fólk ikki í fleiri umførum kunnu fáa eftirløn útgoldna. Lívsverk mælir til, at skulu persónur hava eftirløn útgoldna á øðrum sinni, tí tey flyta av landinum, átti ein áseting at verið um, at viðkomandi skulu ikki hava búð í Føroyum í 10 ár.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Fíggjarmálaráðið tekur undir við hesi broytingini og hevur tillagað lógaruppskotið samsvarandi (broyting nr. 3 er sett í lógaruppskotið).

Ummælissvar frá Samtaki
Samtak tekur sum heild undir við lógaruppskotinum. Samtak mælir til at persónar, sum koma aftur til landið, og sum áður hava fingið pensjón útgoldna, og vinna sær meira pensjón, skulu ikki hava møguleikan at fáa hana útgoldna í úrtíð á øðrum sinni, uttan so at 10 ár eru liðin eftir næstu flytingina í annað land.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Fíggjarmálaráðið tekur undir við hesi broytingini og hevur tillagað lógaruppskotið samsvarandi (broyting nr. 3 er sett í lógaruppskotið).

Ummælissvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelagi
Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur serliga tvær viðmerkingar til lógaruppskotið. Fyrra viðmerkingin snýr seg um uppskotið um ávirkanina á kappingina um starvsfólkini av at strika frítøkuna fyri persónar, sum flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, og heimildina til í staðin at rinda út aftur samansparing. Seinna viðmerkingin snýr seg um grundgevingina fyri at skjóta upp at strika heimildina fyri frítøku av inngjaldi til eftirløn í sambandi við tíðaravmarkað starv.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Mett verður ikki, at tað fer at hava við sær neiliga ávirkan á kappingina um starvsfólk, um frítøkan fyri persónar, sum flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, verður strikað og heimild verður til í staðin at rinda út aftur samansparing.

Fíggjarmálaráðið metir sum heild ikki, at hetta fer at ávirka kappingina um starvsfólk, um kunnað verður væl og virðiliga til útlendsk starvsfólk um skipanirnar, sum eru í Føroyum á eftirlønarøkinum, undir hesum at heimild verður sbrt. lógaruppskotinum *at rinda út aftur* samansparing.

Tað er millum annað ein uppgáva hjá arbeiðsgevarum í Føroyum – saman við almennum myndugleikum – at kunna útlendsk starvsfólk, sum koma og ætla at koma til Føroya at arbeiða, væl og virðiliga um tær skipanir, sum eru í Føroyum á eftirlønarøkinum og á arbeiðsmarknaðinum sum heild. Fíggjarmálaráðið ger eisini vart við, at tað er ein fyrimunur, eisini fyri útlendsk starvsfólk, at spara saman til egna eftirløn, og at lønarinntøka, sum verður spard saman til eftirløn, ikki er mist ella fer fyri skeytið.

Umsitingarliga byrðan fyri TAKS av verandi skipan við frítøku fyri persónar, ið flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, er sera stór. Niðanfyri er stutt lýsing av teimum viðurskiftum, sum gera umsitingina av verandi skipan tunga.

Hvør persónur, sum kemur til Føroya, skal søkja TAKS um av vera frítikin fyri at rinda føroyska eftirløn. Hetta kunnu persónar gera í fleiri umførum. TAKS skal viðgera og taka støðu til hvørja einstaka umsókn og eftirkanna hvønn einasta starvssáttmála, áðrenn avgerð kann takast.

Upprunaliga vóru bara fá størv í Føroyum, sum vóru tíðaravmarkað. Nú er meginparturin av størvunum hjá útlendingum tíðaravmarkað størv. Mett verður, at hetta er orsakað av eftirlønarlógini.

Tað vísir seg, at flestu persónar, sum koma til Føroya í tíðaravmarkað starv, søkja ikki um frítøku, áðrenn starvið byrjar og heldur ikki, áðrenn fyrsta lønin verður útgoldin. Flestu persónar hava tí longu rindað inn til føroyskan eftirlønarveitara, tá ið søkt verður um frítøku.

Tá ið persónar, sum hava rætt til undantak, hava goldið inn áðrenn søkt varð um undantak, so hava viðkomandi rætt til at fáa peningin út aftur sum vanliga inntøku. Fyri tað fyrsta er nógv arbeiði av at fáa fólk at skilja reglurnar við tíðaravmarkaðum starvi – bæði arbeiðstakarar, arbeiðsgevarar og onnur. Borgarar søkja mangan um undantak vegna tíðaravmarkað starv langt aftaná, tey eru byrjað at arbeiða. Tá skulu tey senda umsókn og avrit av starvssáttmála. Staðfestir sáttmálin ikki tíðaravmarkað starv (ongin endadagfesting ásett), so gera tey alt fyri at strika upprunasáttmálan og gera nýggjan fyri at fáa eftirlønina út.

Málsviðgerðin við útgjaldinum av eftirløn, sum er goldin inn av órøttum, er í stuttum hon, at TAKS skal umbóka eftirlønina til a-inntøku. Av hesum eru nógvar rættingar við nógvum manuellum handlingum og nógvum samskifti. Harafturat er tað ein avbjóðing at halda skil á teimum 60 mánaðunum, sum skulu undantakast, av tí at nógvir av útlendingunum eru ikki her í heil ár.

Samanumtikið er skipanin við frítøku fyri inngjald til eftirløn í sambandi við tíðaravmarkað starv ómetaliga tung at umsita fyri TAKS. Tilgongdin við málsviðgerð og mannagongdir eru effektiviseraðar og talgildar, so nógv sum til ber. Fíggjarmálaráðið og TAKS meta ikki, at til ber at lætta meira um umsitingina av hesum økinum við meira effektivisering av mannagongdum ella við meira talgilding.

At enda skal Fíggjarmálaráðið gera vart við í sambandi við verandi reglur um tíðaravmarkað starv og eftirløn, at verandi skipan avlagar arbeiðsmarknaðin á tann hátt, at treytirnar eru ymiskar alt eftir um talan er um føroyska arbeiðsmegi ella um útlendsk starvsfólk. Onkur av hoyringarpørtunum vísir á hesi viðurskiftini. Hetta er ikki gagnligt fyri arbeiðsmarknaðin, umframt at summir útlendingar, sum verða verandi í Føroyum í longri áramál og møguliga varandi, í summum førum hava lítla eftirlønarsamansparing, tá ið tey nærkast pensjónsaldri eftir verandi skipan.

Ummælissvar frá Gjaldstovuni
Gjaldstovan hevur eina viðmerking til uppskotið til broyting av § 9, stk. 1. Gjaldstovan vísir á, at til ber at útseta fólkapensjónina. Higartil hevur hetta borið við sær, at tað ber til útseta útgjaldið úr eftirlønargrunninum, til samanspararin fær útgoldið fólkapensjón. Tað ber til at útseta fólkapensjónina fleiri ferðir, og tað er ikki einfalt at fáa boðini millum skipanirnar, so hetta hevur gjørt umsitingina trupla, sum víst verður á í lógaruppskotinum.

Gjaldstovan hevur fleiri ferðir mælt til, at sambandið millum fólkapensjón og eftirlønarútgjald verður kvett. At tað verður ein spurningur millum samanspararan og eftirlønarfelagið, nær eftirlønarútgjaldið byrjar. Fólkapensjónsaldurin hevur hjá fleiri einki samband við, nær tey fara úr starvinum.

Viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum
Fíggjarmálaráðið tekur lutvíst undir við viðmerkingunum frá Gjaldstovuni, og verandi ógreiðu ásetingar um, nær samansparingar skulu fara í útgjald, og nær inngjøld skulu steðga, eru ein orsøk til lógaruppskotið.

Mett verður ikki, at verandi ásetingar samsvara við hugtakið pensjónsuppsparing. Verandi ásetingar hava millum annað við sær, at samanspararar kunnu rinda inn til egna eftirløn og bíða við at seta sína uppsparing í útgjald, til tey nærkast 80-ára aldur.

Fíggjarmálaráðið metir ikki, at til ber at knýta útgjald úr privatu eftirlønarsamansparingini at, um fólk móttaka fólkapensjón ella ikki. Fíggjarmálaráðið metir, at ein tílík skipan hevði verið ógjørlig at umsitið serliga fyri eftirlønarveitarar. Harafturat hevði hetta havt avleiðingar við sær fyri inngjaldstíðarskeiðið, sum eisini høvdu gjørt umsitingina truplari.

Gjaldstovan nevnir, at í teimum førum, har ið eldri fólk flyta á ellisheim, tá er gjaldið fyri búpláss ávirkað av inntøkuni, og at inntøkan verður lægri, enn hon annars hevði verið.

Verandi brúkaragjøld fyri føst búpláss á ellis- og røktarheimum ella eldrasambýlum eru mett at fíggja umleið 10% av rakstrarkostnaðinum, sum eldrasamstørvini hava av búplássunum á ellis-, røktarheimum og eldrasambýlum. Brúkaragjøldini fíggja tí bara ein minni part av samlaða rakstrarkostnaðinum, og tí fer tað at hava avmarkaða ávirkan á inntøkurnar, sum eldrasamstørvini hava av gjøldum fyri føst búpláss á ellis-, røktarheimum og eldrasambýlum, um ásetingarnar um, nær samanspararar fara í útgjald, verða broyttar.

Fíggjarmálaráðið ger eisini vart við, at pensjónsuppsparing sbrt. eftirlønarlógini er ein *skattastuðlað uppsparingarskipan*, sum hevur við sær, at inngjøld sbrt. eftirlønarlógini eru lægri skattað enn vanlig arbeiðsinntøka, umframt at avkastið í tíðarskeiðinum frá inngjaldi til útgjald er skattafrítt. Tað sama er ikki galdandi fyri avkast av aðrari uppsparing. Fíggjarmálaráðið mælir til, at reglurnar verða greiðari um, nær útgjøld skulu byrja sbrt. eftirlønarlógini, og um, hvussu leingi gjaldast kann inn til eftirlønarsamansparing sbrt. eftirlønarlógini.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at broytingarnar í lógaruppskotinum fara at hava við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan, verður lógaruppskotið samtykt og broytingarnar settar í verk.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður, at broytingarnar fara at lætta um umsitingina av eftirlønarlógini fyri borgarar og fyri TAKS.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Verður lógaruppskotið samtykt, fer tað at lætta um umsitingina av eftirløn fyri arbeiðsgevarar og vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið fer at lætta um umsitingarliga fyri persónar, sum koma til Føroya at arbeiða í styttri tíðarskeið og sum fara av aftur landinum. Við hesari broytingini skulu persónar, sum koma til Føroya at arbeiða, rinda inn til eftirløn á sama hátt, sum føroyingar skulu. Men vísir tað seg, at teir ikki verða verandi í landinum, og ikki hava verið her longri enn í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt, kunnu teir fáa eftirlønarsamansparingina útgoldna ella flutta til eftirlønarskipan, sum teir hava uttanlands.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja. Nevnast kann, at eftirløn sbrt. eftirlønarlógini er ein *privat eftirløn*, hóast hon er tvungin. Privat eftirløn er ikki fevnd av *Nordisk konvention om sosial sikring*.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru ikki, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið ger tað smidligari at arbeiða uttanlands hjá útlendskum arbeiðsgevara, og tekur tí burtur ávísar markaforðingar. Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki

2.11. Skattir og avgjøld
Í lógaruppskotinum eru ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Í verandi eftirlønarlóg er í § 1, stk. 8, er ein skylda áløgd persónum, ið eru fevndir av lógini, og sum ikki frammanundan hava eina eftirlønarskipan, til at stovna eftirlønarkonto í sambandi við starvsetan, ella í sambandi við, at hann móttekur inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av.

Í hesum uppskotinum er ásett ein freist til persónar at stovna eftirlønarkonto innan tríggjar mánaðir frá tí, at persónurin hevur móttikið inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av. Er hetta ikki gjørt innan freistina, kann TAKS vegna persónin stovna eftirlønarkonto hjá góðkendum eftirlønarveitara og flyta eftirlønarsamansparing, ið stendur á depotkonto hjá TAKS til eftirlønarkonto hjá persóninum.

Grundgevingin er, at TAKS er ikki og kann ikki vera eftirlønarveitari og kann ikki umsita útgjald sambært leistinum í eftirlønarlógini. Ætlanin hevur ongantíð verið, at depotkonturnar hjá TAKS skulu virka sum ein eftirlønarsamansparing.

Lógaruppskotið ásetur, at upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal gjaldast út á, skulu vera í fráboðan til TAKS um, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal gjaldast út.

Lógaruppskotið áleggur eisini eftirlønarsamanspararum at lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal gjaldast út á.

Lógaruppskotið leggur ikki aðrar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið hevur við sær, at til ber at rinda út aftur inngjøld, sum persónur, sum hevur uppihildið sær í Føroyum í í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt, og sum er fluttur av landinum aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur rokkið fólkapensjónsaldur. Landsstýrismaðurin ásetir síðani í kunngerð nærri reglur um hetta.

Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
Fíggjarmálaráðið mælir til at broyta orðið "skal" til "kann" í § 1, stk. 4 í eftirlønarlógini. Endamálið við broytingini er at gera greiðari í lógini, at persónar, sum hava sett sína eftirlønarsamansparing í útgjald sambært eftirlønarlógini, ikki kunnu halda fram at rinda inn til egna eftirløn sambært eftirlønarlógini, samstundis sum teir fáa útgjøld. Fíggjarmálaráðið metir, at hetta hevur verið ætlanin, tá ið eftirlønarlógin varð sett í gildi, men orðaljóðið í § 1, stk. 4 um hetta er óneyðuga ógreitt.

Í serligu viðmerkingunum til § 1, stk. 4, í eftirlønarlógini stendur soleiðis (sí løgtingsmál nr. 121/2012): "*Henda áseting fer at gera greiðan skilnað millum, at tá fólk eru byrjað útgjald av eftirløn, skal ikki longur rindast eftirlønarinngjald. Hesi mugu sostatt fáa ein møguligan eftirlønarpart rindaðan sum vanliga løn*". Hetta bendir greitt á, at ætlanin frá byrjan av hevur verið, at persónar, sum eru farnir í útgjald, kunnu ikki halda fram at rinda inn til egna eftirløn.

Til § 1, nr. 2
Við uppskotinum verður frítøkan í verandi § 1, stk. 5 í eftirlønarlógini fyri persónar, ið flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, strikað.

Í dag er meginparturin av størvunum, sum útlendingar hava í Føroyum, tíðaravmarkað størv. Upprunaliga vóru bara nøkur heilt fá av hesum størvunum tíðaravmarkað størv. Mett verður, at hetta er orsakað av eftirlønarlógini.

Umsitingarliga byrðan fyri TAKS av verandi skipan við frítøku fyri persónar, ið flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, er sera stór. Tey viðurskifti, sum gera verandi skipan tunga at umsita fyri TAKS, eru lýst á bls. 10 og 11 í lógaruppskotinum.

Við broytingini verður í staðin heimild til at gjalda út aftur eftirlønarsamansparing hjá persónum, sum flyta av landinum aftur. Treytirnar vera at kalla tær somu, sum frítøka verður veitt sambært í dag. Tað vil siga treytað av, at persónurin hevur uppihildið sær í Føroyum í í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt og ikki longur arbeiðir ella hevur uppihald í Føroyum.

Við at hava uppihald í Føroyum meinast í hesum sambandi, at persónur hevur lógligt uppihald og fastan bústað í Føroyum.

Í sambandi við at eftirlønin verður útgoldin, verða ikki gjørdar broytingar í skattskyldugu inntøkuni ella í eftirlønarskattinum aftur í tíð.

Við hesari broytingini skulu persónar, sum koma til Føroya at arbeiða, rinda til eftirløn á sama hátt, sum føroyingar skulu. Men vísir tað seg, at teir ikki verða verandi í landinum, og ikki hava verið her longri enn í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt og ikki longur arbeiða ella hava uppihald í Føroyum, kunnu teir fáa eftirlønarsamansparingina útgoldna ella flutta til eftirlønarskipan, sum teir hava uttanlands.

Tá skal TAKS bara eftirkanna, um persónurin lýkur treytirnar um tíðarskeið og TAKS og borgarin sleppa undan, at broytingar verða gjørdar í skattskyldugu inntøkuni og í

eftirlønarskattinum aftur í tíð. Óneyðugt verður eisini, at TAKS skal hava prógv fyri, at lønarsáttmálar eru tíðaravmarkaðir.

Broytingin merkir, at persónar, sum lúka treytirnar, kunnu fáa sítt inngjald út aftur frá eftirlønarveitara, uttan at nakrar broytingar verða gjørdar í skattaviðurskiftunum. Eftirlønarskattur, sum er goldin, verður ikki broyttur. Frádráttur, sum er givin í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjaldið, verður ikki broyttur.

Til § 1, nr. 3
Endamálið við uppskotinum til stk. 6 er at áseta, at persónar ikki í fleiri umførum kunnu fáa eftirløn útgoldna. T.e. skal persónur hava eftirløn útgoldna á øðrum sinni, tí viðkomandi flytur av landinum, tá skal viðkomandi ikki hava búð í Føroyum í 10 ár.

Til § 1, nr. 4
Við uppskotinum fær TAKS heimild til at flyta inngjøld, sum standa á depotkonto, til ein av góðkendu eftirlønarveitarunum í Føroyum, og harvið fær TAKS heimild til at stovna eftirlønarkonto vegna persónar, sum ikki sjálvir stovna eftirlønarkonto, sum teir annars hava skyldu til sbrt. § 1, stk. 8 í eftirlønarlógini.

Viðmerkjast skal, at ætlanin ongantíð hevur verið, at depotkontur skulu virka sum eftirlønarsamansparing. TAKS er ikki eftirlønarveitari og kann ikki umsita útgjald sambært leistinum í eftirlønarlógini.

Til § 1, nr. 5
Sambært eftirlønarlógini § 2, stk. 8 kann í mesta lagi ein triðingur av tí í stk. 1 ásetta minsta eftirlønargjaldi fara til persónstryggingar, restin skal fara til eftirlønarsamansparing. Álagt er veitarunum at tryggja, at hámarkið verður fylgt.

Í ásetingini í § 2, stk. 8 er ikki greitt, hvørt talan er um ein triðing av eftirlønargjaldinum áðrenn ella eftir skatt. Hetta er ein avbjóðing í sambandi við umsitingina av lógini, millum annað fyri eftirlønarveitarar. Hetta millum annað tí, at eftirlønarveitarar hava ikki innlit í, hvørt eftirlønargjaldið samsvarar við ásetta minsta gjaldið í § 2, stk. 1. Tá ið tað er eftirlønarveitarin, ið skal tryggja, at hámarkið verður fylgt, eigur at vera gjørt greitt, at talan er um tað eftirlønargjald, ið veitarin móttekur.

Endamálið við hesari broytingini er at gera ásetingina í § 2, stk. 8 greiða, soleiðis at talan greitt er um eftirlønargjaldið eftir skatt.

Til § 1, nr. 6
Við uppskotinum verður markið fyri, nær TAKS skal senda eftirlønarkrav av B-inntøkum hækkað til 500 kr., so hetta samsvarar við líknandi mark í kapitalvinningsskattalógini. Hetta merkir, at *eftirlønarparturin* av B-inntøkum skal vera í minsta lagi 500 kr., áðrenn tað verður álagt at rinda sbrt. hesi lóg.

Sambært eftirlønarlógini § 2, stk. 10 er galdandi mark fyri, nær TAKS sendir krav um gjald til eftirløn, sett til 30 kr. Mett verður ikki, at tað er skynsamt at krevja inn so lítla upphædd, tí eitt krav, sum verður sent við brævi, kostar í dag meira enn 30 kr. at senda. Sambært uppgerð frá TAKS, verða árliga sendar nógvar rokningar fyri eftirløn uppá sera lítlar upphæddir. Til dømis verða árliga sendar væl omanfyri 1.000 rokningar fyri eftirlønargjald frá TAKS uppá upphæddir undir 500 kr.

Sambært § 18 í kapitalvinningsskattalógini verður írestandi skattur, ið er 500 kr. ella minni, ikki kravdur inn. Fíggjarmálaráðið og TAKS mæla til, at markið fyri, nær TAKS sendir eftirlønarkrav av B-inntøkum, hækkar til 500 kr., so markið samsvarar við líknandi mark í kapitalvinningsskattalógini.

Til § 1, nr. 7
Fíggjarmálaráðið og TAKS mæla til, at ásett verður í eftirlønarlógini, at eftirlønargjøld (inngjøld), sum enn ikki eru goldin, tá ið persónur doyr, ella nær fólkapensjónsaldur, fella burtur. Mett verður ikki, at nakað høpi er í at heinta inn skuldkomin eftirlønargjøld, tá ið persónur er komin til fólkapensjónsaldur ella at krevja inn eftirlønargjøld frá deyðsbúgvum, tá ið persónur er deyður.

Ásett verður, at skuldkomið eftirlønargjald fellur burtur, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir, ella tá ið eftirlønarsamansparari doyr. Ásetingin skal skiljast soleiðis, at hon er galdandi fyri øll tílík eftirlønargjøld, sum ikki eru goldin, tá ið broytingin kemur í gildi.

Til § 1, nr. 8
Talan er um fylgibroyting orsakað av broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. § 13 a er sett inn í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eftirfylgjandi, og eftirlønargjald verður í dag lagt omaná veitingina.

Til § 1, nr. 9
Talan er um eina rætting í eftirlønarlógini og fylgibroyting av, at heitið á løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar er broytt. Orðið "v.fl." er strikað úr heitinum á lógini, og harafturat verður orðið "pensiónistar" brúkt í tí lógini.

Til § 1, nr. 10
Talan er um fylgibroyting av, at løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021, og av at samstundis varð sett úr gildi lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg.

Til § 1, nr. 11
Talan er um fylgibroyting av, at løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening er sett úr gildi (løgtingslóg nr. 126 frá 13. desember 2024 um at seta úr gildi løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening og løgtingsmál nr. 18/2024).

Til § 1, nr. 12
Við uppskotinum verður § 3, stk. 1, nr. 18 (sum verður nr. 17) broytt, og heimild verður givin til, at persónur, sum hevur eftirlønarskipan uttanlands, men sum tó ikki rindar lógarkravdu upphædd til ta skipanina sbrt. § 2, stk. 1 í eftirlønarlógini, kann rinda munin í Føroyum. So hvørt sum kravda eftirlønargjaldið er hækkað síðstu árini, eru tað fleiri og fleiri persónar, sum ikki rinda tað í lógini kravda prosentið til skipanir uttanlands. Hesar skipanir kunnu annars góðkennast sambært ásetingunum í kunngerðini við heimild í verandi § 3, stk. 1, nr. 18.

Við broytingini verður møguleiki fyri og heimild til, at restupphæddin, upp til kravda prosentið sbrt. eftirlønarlógini, kann rindast í Føroyum. Við broytingini slepst undan, at TAKS skal taka avgerð um, at útlendska skipanin ikki longur er "nøktandi", og við teirri avleiðing, at persónurin skal rinda fult gjald í Føroyum, tí skipanin ikki lýkur treytirnar fyri undantakinum.

Til § 1, nr. 13
Ásett verður við hesi broytingini til § 9, stk. 1, at útgjald skulu byrja mánaðin eftir, at eftirlønarsamanspararar røkka fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir o.a., tó við undantøkunum í stk. 5 og 9. Seinni partur av § 9, stk. 1 verður ikki broyttur sbrt. uppskotinum. Sbrt. verandi orðing av § 9, stk. 1, er ásett, at útgjald av eftirløn kann í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari røkkur fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir o.a., og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón.

Fíggjarmálaráðið metir, at hendan ásetingin um, nær útgjald skulu byrja og saman við ásetingunum í § 1 í eftirlønarlógini um, hvussu leingi rindast skal inn til eftirløn og saman við skipanini *útsett pensjón*, er ógreið. Millum annað orsakað av møguleikanum at útseta útgjaldið av fólkapensjón, er hendan ásetingin við tíðini vorðin ógreið.

Fíggjarmálaráðið ger vart við, at arbeiðsgevarar fáa onga sjálvvirkandi kunning um og hava ongan møguleika at halda skil á, og eingin skylda er hjá lønmóttakarum at boða frá, um tey eru í skipanini útsett pensjón ella ikki. Hetta ger tað torført hjá arbeiðsgevarum at halda skil á, um lønmótakarar, sum eru omanfyri almenna fólkapensjónsaldurin, framhaldandi skulu rinda inn til eftirløn ella ikki.

Fíggjarmálaráðið ger eisini vart við, at til ber at fara út úr og í aftur skipanina viðvíkjandi *útsettari pensjón* upp til tvær ferðir. Hetta merkir, at tað ikki ber til at knýta *inngjaldstíðarskeiðið* at, um fólk móttaka fólkapensjón ella ikki. Flestu eftirlønar-samanspararar seta sína samansparing í útgjald, tá ið tey kunnu, við almenna fólkapensjónsaldurin.

Høvuðsendamálið við broytingini, sum skotið verður upp at gera viðvíkjandi § 9, stk. 1, er at gera ásetingina greiðari og lættari at umsita.

Fíggjarmálaráðið mælir til, at ásett verður í eftirlønarlógini, at eftirlønarsamansparingar fara í útgjald við almenna fólkapensjónsaldurin (tó við undantøkunum í § 9, stk. 5 og stk. 9). Við verandi lóggávu ber til at bíða við at fáa eftirlønina útgoldna, til samanspararar nærkast 80'ára aldur, um fólkapensjónin verður útsett sum longst. Fíggjarmálaráðið metir ikki, at hetta samsvarar við endamálið við tvungnari eftirlønarsamansparing.

Tvey atlit hjá Fíggjarmálaráðnum í sambandi við broytingarnar í § 9, stk. 1 og í § 1, stk. 4 hava verið at tryggja í fyrra lagi, at samanspararar ikki kunnu rinda *inn* til sína egnu eftirløn, *samstundis* sum at rindað verður *út* úr samanspardu eftirlønini. Seinna atlitið hevur verið at tryggja, at útgjøld úr samanspardu eftirlønini byrja, samstundis sum at inngjøldini til eftirlønina steðga. Hetta fer at gera skipanina við eftirlønarsamansparing greiðari og lættari at umsita.

Til § 1, nr. 14
Við hesi broytingini til § 9, stk. 2, 3. pkt. verður ásett, at upplýsingar um kontonummar og peningastovn, har ið samansparda eftirlønin skal gjaldast út á, skulu vera við í fráboðanini til TAKS um, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal gjaldast út.

Endamálið við hesum er at tryggja, at eftirlønarveitarar hava og fáa neyðugu upplýsingarnar um banka og kontonummar hjá samanspararum, sum skulu byrja útgjald. Í summum førum fáa eftirlønarveitarar ikki upplýst kontonummar, og kunnu tískil ikki gjalda út, hóast samansparari fær fólkapensjón. Í summum førum kann samansparingin standa leingi hjá eftirlønarveitarum uttan at til ber at gjalda hana út.

Til § 1, nr. 15
Til stk. 10
Við uppskotinum til nýtt stk. 10 í § 9 verður ásett, at eftirlønarsamansparari skal lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal gjaldast út á.

Til stk. 11
Í uppskotinum til nýtt stk. 11 í § 9 verður ásett, at eru upplýsingarnar ikki latnar eftirlønarveitaranum, kann eftirlønarveitari flyta útgjaldið á depotkonto, ið ikki fær tilskrivað avkast. Eftirlønarveitari kann eisini flyta útgjald á sentrala, løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er knýtt at Vanganum, tá ið hesar kontur væntandi eru liðugt mentar frá 2028.

Í sambandi við uppskotið til nýtt stk. 11 í § 9 skal gerast greitt, at talan sjálvsagt *ikki* er um depotkonti hjá TAKS sbrt. § 16a í eftirlønarlógini, men at talan er um depotkonto, sum eftirlønarveitarar fáa heimild at stovna vegna samanspararar til júst hetta endamálið í teimum førum, har upplýsingar um peningastovn og kontonummar vanta og ikki eru latnar eftirlønarveitara.

Til stk. 12
Uppskotið til nýtt stk. 12 í § 9 ger greitt, at býtið av útgjaldinum millum kapitalútgjald, lutaeftirløn og lívlanga veiting skal gerast samsvarandi ásetingunum um hetta í stk. 2 í § 9, áðrenn útgjald verður flutt til samanspararan. Hetta er eisini galdandi fyri útgjald sbrt. stk. 11. Ásett verður eisini, at eftirlønarveitari í nevndu førum skal rinda útgjald mánaðarliga umvegis afturhaldsskipanina sbrt. § 9, stk. 6 í lógini.

Til § 1, nr. 16
Við uppskotinum verður tilvísingin til § 1, stk. 6 strikað í § 12, stk. 3, 2. pkt. Talan er um eina fylgibrøyting av einari eldri broyting í eftirlønarlógini. Av tí at § 1, stk. 6 í hesum føri verður endurnýtt (broyting nr. 3), verður mett greiðast at strika tilvísingina til § 1, stk. 6 í § 12, stk. 3, 2. pkt.

Til § 1, nr. 17
Við uppskotinum verður heimild til at flyta eftirløn ella at savna saman eftirløn hjá einum veitara. Hetta verður eftir uppskotinum ásett sum nýtt stk. 1 í § 15.

Í § 10, stk. 1 í eftirlønarlógini er ein heimild at savna saman eftirlønir hjá fleiri veitarum, tá farið verður í útgjald, men eingin heimild er í eftirlønarlógini at flyta eftirløn millum veitarar ella at savna saman, áðrenn útgjald byrjar.

Vísast kann á, at tílík heimild at flyta skipan frá einum veitara til annan, uttan at hetta verður roknað sum útgjald, er í § 9 í rentutryggingarlógini. Við hesari broytingini verður líknandi heimild ásett í § 15 í eftirlønarlógini.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2026.

Fíggjarmálaráðið, 04.11.2025

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Landsbankanum
Fylgiskjal 3: Ummæli frá TAKS
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Antares
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Betri Pensjón
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Lív
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Felagnum Peningastovnar
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Lívsverki
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Samtaki
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelagi
Fylgiskjal 11: Ummæli frá Gjaldstovuni